# SetHúsaSølan

Sp/f SHS · Tórsgøta 16 · Postboks 3156 · FO-110 Tórshavn
Fax 320 252 · sethusas@post.olivant.fo · www.sethusasolan.fo
Avgreiðslutíð: 10 - 13 á tel 210252
Skrivstovan opin: 14 - 17 tel 320252

**Tórshavn: Eigaraíbúð til sølu, Berjabrekka 19**



Berjabrekka 19
matr.nr.1464c, grundøki uml.133 m².
Íbúðin, ið er bygd síðst í 80-árunum, er í 2 hæddum, sera væl innrættað, stovu-og loftshædd, íalt uml. 97,4m² + ùthús 5,4m²
Á stovuhæddini er: Durur,WC, gong,køkur, stova
Á Loftshæddini er: Gong, hjúnarúm, 2 kømur, baðirúm.
Frá stovuhæddini er terassa .
**Íbúðin verður seld um nøktandi boð verður givið.**

**Sethús í Sørvági til sølu**



Matr. nr. 119s, grundøkið íalt 770 m².
Húsini eru betong/timburhús frá miðskeiðis í 80-árunum. Bygd í tveimum forskotnum hæddum, íalt uml. 147m²
Á 1. hæddini er: gong, køkur, grovkøkur, hjallur, stova og WC.
Á 2. hæddini er: hjúnarúm, 2 kømur og baðirúm.
Til húsini er 9 m² úthús til goymslu.
Húsini hava fingið nýtt tak fyri sjey árum síðani og stovan er umvæld av nýggjum.
**Húsini verða seld um nøktandi boð verður givið.**

SELT

**Argir: Nýggj Sethús til sølu**



Leitisgøta 8, Argir. matr. nr. 4 eq, grundøki 500 m².
Tvey ára gomul arkitektteknaði hús til sølu. Húsini eru i 2 hæddum, íalt 200 m², alt inrættað úr besta tilfari. Leys garasja frá húsinum 35 m². Sera framkomin el- og hitaskipan, ( IHC)
Á niðaru hæddini er: gong, trappa upp, tvey kømur, stórt ítrivsrúm, goymslurúm, baðirúm og kjallarúm.
Á ovaru hæddini: gong, kamar , baðirúm, grovkøkur, hjallur, køkur og stova í einum. Frá stovuni er altan. Húsini liggja sera væl fyri, og hava sera gott útsýni.
**Verður selt, um nøktandi boð verður givið.**

**Tórshavn: Tróndargøta 28 til sølu**



matr. nr. 315, Tórshavn, grundøki 119 m².
Húsini, ið eru í 3 hæddum. Kjallara- stovu- og loftshædd hvør uml. 45 m².
Á stovuhæddini er gong, wc, køkur og 2 stovur, eitt kamar.
Á loftshæddini er gong, 2 kømur.
Kjallarahæddin er óinnrættað,við oljufýri og brúsirúm.
Húsini eru bygd 1910, umvæld 1979, klædningurin og vindeygur skift.
Oljufýr og ketil frá 1970.
**Søluprísur kr. 900.000,- + tinglýsing og kostnað.**

**Tórshavn: Sethús Oman Mattalág 6**



Matr. nr. 899p, grundøki 322 m².
Húsini, ið upprunaliga eru bygd í 60 árunum, eru í 3 hæddum, íalt umleið 240 m².
Stoypt grund, stovu- og loftshæddin timbur, klødd við plastbrettum í 70 árunum og bjálvaði. Eternittak.
Termorútar í stovu- og loftshæddini.
Í stovuhæddini er gong, WC, kamar, køkur og 2 stovur.
Á loftshæddini er gong, baðirúm, hjúnarúm við altani og 2 kømur. Í kjallarahæddini er ítrivsrúm, hjallur og stórt kjallararúm. Húsini eru vælhildin, og hava gott útsýni frá loftshæddini!
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið.**

NÝTT

**Tórshavn: sethús Marknalíð 15**



matr. nr.1201b, grundøki 412 m².
Húsini eru í 3. hæddum, kjallara- stovu- og loftshædd íalt uml 262 m². Á stovuhæddini er durur, hjallur, gong, køkur, stova, hjúnarúm, 2 kømur og baðirúm. Á loftshæddini er stova, kamar og goymslurúm . Í kjallarahæddini er durur, gong, 2 stór kømur, wc, brúsa og kjallararúm. Húsini hava fingið ymiskar umvælingar, nýtt tak, allar innhurðar eru skiftar og hvítvørur so sum køli/frystari og komfýrur/eymhetta er nýtt. Frá stovu- og loftsvindeyganum er sera gott útsýni yvir Havnina, Nólsoynna og Nólsoyarfjørð.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið.**

Sosialurin 341800


# Valið stendur millum Símun og Suna

**Hóskvøldið høvdu tey sjey umboðini, sum eru vald og afturvald í bygdaráðið í Nes kommunu, fund um skipan. Avtalað varð at hava nýggjan fund aftur í gjárkvøldið, har ætlanin var at skipað bygdaráðið endaliga**

SKIPAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Mangt bendir á, at Símun Johannesen verður nýggjur borgarstjóri í Nes kommunu og Súni í Hjøllum varaborgarstjóri*

*Mynd: Rúna Sivertsen*

Eftir fundin hjá nývalda bygdaráðnum í Nes kommunu hóskvøldið var ikki alment greitt, hvussu bygdaráðið fer at skipa seg.

Sosialurin royndi í gjáramorgunin at fáa orð á Súna í Hjøllum, sum varð fyrstvaldur og Símun Johannesen, sum við valið hesaferð hevði næst flestar atkvøður, men hetta eydnaðist ikki.

Vit hava tó skilt, at fundurin hóskvøldið var ikki endaligur, og bygdaráðið avgjørdi at hittast aftur til fundar fríggjakvøldið.

Ætlanin er, at nýggja bygdaráðið verður valt á almennum bygdaráðsfundi leygarkvøldið ella mánadagin.

Soleiðis, sum Sosialurin hevur skilt støðuna, bendir mangt á, at Símun Johannesen verður borgarstjóri og Súni í Hjøllum, varaborgarstjóri.

Vit hava eisini skilt, at nývalda bygdaráðið ætlar at samstarva um val av nevndum og umboðum, har kommunan hevur umboð.

## Stór útskifting

Súni í Hjøllum og Símun Johannesen eru teir einastu, sum eru eftir av gomlu »garduni« í Nes kommunu. Á valinum týsdagin fullu Haldur Vang og Jan Danielsen. Marjun Gaardbo, Katrin Poulsen og Eyðfinn Olsen lótu seg ikki stilla uppaftur.

Tríggir listar vóru til valið hesaferð. Almenni listin (listi A) fekk trý umboð; Súni í Hjøllum, sum varð fyrstvaldur við 60 atkvøðum, Símun Johannesen (53) og Petur J. Petursen (43). Listi B (Kvinnulistin) fekk tvey umboð; Helen H. Jacobsen (34) og Elin á Torkilsheyggi (32). Listi C fekk eisini tvey umboð; Petur í Túni (31) og Eyðfinn Johannesen (29), sum vann lutakastið við Mortan Højgaard, ið eisini hevði 29 atkvøður.

Hetta er fyrstu ferð, at kvinnulistin, sum nú hevur fleiri ár á baki í Nes kommunu, hevur fingið tvey umboð.

Á seinasta vali varð Katrin Poulsen vald á kvinnulistanum, meðan Marjun Gaardbo, sum seinastu fýra árini hevur verið borgarstjóri, varð vald á almenna listanum.

# Nýggja býráðið fer til verka

**Nývalda býráðið í Runavíkar kommunu skipaði seg á almennum fundi í býráðshøllini í Saltangará hóskvøldið**

SKIPAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Nývalda býráðið í Runavíkar kommunu. Fremst, fv.: Regin Jacobsen, Kári P. Højgaard, Rodmundur Nielsen og Hans J. Lamhauge. Aftast, fv.: Kári Johannesen, Kristian Gaardbo, Ólavur A. Olsen, Hans P. Ellingsgaard, Regin Olsen, Asbjørn Mikkelsen og Klæmint Østerø.*

*Mynd: Judith Johannesen*

Býráðið er skipað við Rodmundi Nielsen, sum borgarstjóra og Kára P. Højgaard sum varaborg-arstjóra.

Tær føstu nevndirnar eru valdar við formonnum, nevndarlimum og eykalimum, og somuleiðis hevur býráðið valt síni umboð í aðrar nevndir og stýri, har kommunan er umboðað.

Aftrat hesum hevur kommunan, sum nú er vaksin við trimum øðrum kommunum, Skála kommunu, Oyndarfjarðar kommunu og Elduvíkar kommunu, valt Skálanevnd, Oyndarfjarðarnevnd og Elduvíkarnevnd.

Í Skálanevndini sita: Gunnvør G. Hansen, Petur Poulsen, Súni S. Kristiansen. Varalimir eru: Jens Bech og Ruth Poulsen. Fyri Runavíkar býráð eru umboðini: Rodmundur Nielsen og Kári Johannesen. Varalimur er: Asbjørn Mikkelsen.

Í Oyndarfjarðarnevndini sita: Erika L. Petersen, Hallur Ellingsgaard og Ingeborg Jacobsen. Varalimir eru: Louis Houman og Janhild Olsen. Fyri býráðið eru umboðini: Rodmundur Nielsen og Kári P. Højgaard. Varalimur er: Hans J. Lamhauge.

Í Elduvíkarnevndini sita: Michael Pattingson, Dánjal Martin Hansen og John Kjeld. Varalimir eru: Frida Reyná og Hans P. Hansen. Fyri býráðið er umboðini: Rodmundur Nielsen og Ólavur A. Olsen. Varalimur er: Klæmint Østerø.





Finn dreymahúsið í Sosialinum

SETHÚSAMARKNAÐURIN





Vælútgjørdur **STIGFJORD 28** við fiskiloyvi 5B til sølu.

Føroyabók
*Skrásett grannskoðaravirki*
Vágstún2
FO-700 Klaksvík
Tlf. 455522 · 217505

**Sosialurin**
www.sosialurin.fo



# Nývald/ur? Stjóri? Leiðari? - Kom á skeið í fjølmiðlavenjing!

>>skeið: "Sjónvarpið kemur um ein tíma! v/ TV2 Midt Vest!"

**Fært tú** ilt í búkin, hjartabankan, fer adrenalinið at pumpa, tá sjónvarpið ringir og biður um eina viðmerking? Sigur tú altíð nei – tú hevur "ikki stundir"? Er sannleikin tann, at tú følir teg ótryggan, følir at tú dugir ikki at málbera teg greitt og beinrakið, samstundis sum tú ert bangin fyri, hvussu upptøkurnar verða nýttar? Tú torir stutt sagt ikki at taka kjansin!

Ella hevur tú drúgvar royndir í at luttaka í kjaki, bæði í sjónvarpi, útvarpi og øðrum miðlum? Tú manglar bert at fáa tað síðsta uppá pláss og eitt gott amboð at fáa boðskap tín fram?

***You're on!* – eitt handverk, tey flestu kunnu læra!**
Á skeiðnum lærir tú at síggja sjónvarp og aðrar miðlar, sum ein møguleika í staðin fyri eina hóttan! Tú fært innlit í, hvussu miðlafólk arbeiða, hvørjar framferðarhættir tey brúka, og tú lærir at føra tín boðskap fram stutt og greitt, til gagns fyri bæði teg og móttakaran.

Skeiðið vendir sær til øll, sum av og á eru at síggja á sjónvarpsskíggjanum og øðrum miðlum, og sum vilja gera tað so gott sum gjørligt.

**MAX. 8 luttakarar á hvørjum skeiði**
Vit hava 2 skeið:
· Fríggjadagin 19. november *(1 pláss eftir)*
· Leygardagin 20. november *(fá pláss eftir)*

***Deadline fyri tilmelding: Mánadagin 15. november '04!***

TEAM85

**Tilmelding og meira um skeiðið á www.synergi.fo**
Tel 22 KIMA (22 54 62) · 22 RING (22 74 64)
Fax 322 355 · www.synergi.fo · synergi@synergi.fo
Synergi

Gallarí Jinx



Ásla Rannvá Svensson
Sýnir fram málningar í november
tel 317101 · jinx@jinx.fo

Sosialurin 341800

# STÓRT ræstkjøta BINGO

OG 25 VINNINGAR Á LUTASEÐLI

EB/STREYMUR

**60.000,- KR. Í VINNINGUM, M.A.**
20 RØST KROV
RÆSTUR FISKUR
BÓKAPAKKAR OG
5 FLOGFERÐIR VIÐ ATLANTIC AIRWAYS

**Í ÍTRÓTTARHØLLINI Á EIÐI SUNNUDAGIN KL. 16.00**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Shellstøðin við Streymin Gávubræv kr.200,- | ½ Íslenskt krov 5 greipur av røstum fiski | Ræst krov |
| 2 | 2 fesk kjógv + 5 greipur | 4-5 kg neytakjøt 5 greipur av røstum fiski | Ræst krov |
| 3 | Turt kjógv + 5 greipur | ½ Íslenskt krov 5 greipur av røstum fiski | Ræst krov |
| 4 | Shellstøðin við Streymin Gávubræv kr.200,- | 4-5 kg neytakjøt 5 greipur av røstum fiski | Ræst krov |
| 5 | Tvær dunnur + 5 greipur | ½ Íslenskt krov 5 greipur av røstum fiski | Ræst krov |
| 6 | Borimaskina + 5 greipur | 4-5 kg neytakjøt 5 greipur av røstum fiski | Ræst krov |
| 7 | Shellstøðin við Streymin Gávubræv kr.200,- | ½ Íslenskt krov 5 greipur av røstum fiski | Ræst krov |
| 8 | Tveir neytalutir + 5 greipur | 4-5 kg neytakjøt 5 greipur av røstum fiski | Ræst krov |
| 9 | Turt kjógv + 5 greipur | ½ Íslenskt krov 5 greipur av røstum fiski | Ræst krov |
| 10 | Shellstøðin við Streymin Gávubræv kr.200,- | 4-5 kg neytakjøt 5 greipur av røstum fiski | Ræst krov |
| 11 | Tvær fleskasteikir 5 greipur | ½ Íslenskt krov 5 greipur av røstum fiski | Ræst krov |
| 12 | Borimaskina + 5 greipur | 4-5 kg neytakjøt 5 greipur av røstum fiski | Ræst krov |

# Kliché matstova

**BUFFET** (mán-frí) **kl. 11.45 - 14.00**
**A la Carte** (mán-ley) **kl. 17.00 - 23.00**
**Sunnudag er stongt**

**- Jólabuffet -**
**26. og 27. november kl. 17.00 - 23.00**
**Møguleiki er fyri størri borðhaldum**

MATUR ÚT AV HÚSINUM
ring og hoyr nærri
tlf. 322404

Sosialurin 341800